

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroelum, er við at hava ætlanirnar fyri komandi árini klárar. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Ben Arabo: Vit fara at bora í Noregi um nakrar dagar

**Jógvan Hugo Gardar**

31.08.2014 - 13:38

Oljan.fo

Atlantic Petroleum er eitt tað virknasta felagið av teimum feløgunum, ið felagið vanliga kann sammeta seg við. Og felagið hevur fleiri ítøkiligar ætlanir um at bora meir.

- Í løtuni bora vit Pegasus brunnin í bretskum øki, og verður hann royndur og goymdur til seinni nýtslu, um hann roynist væl, sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroelum.

- Í september fara vit undir at bora Ivory brunnin í Noregi, og kann hesin verða munagóður fyri felagið. Stórir møguleikar eru í báðum brunnunum, og váðin er avmarkaður, sigur hann.

Næsta ár kann gerast áhugavert, og Ben Arabo sigur at felagið í løtuni er við at gera ætlanina fyri 2015 klára.

- Okkara boriætlan fyri 2015 og frameftir er við at verða løgd. Í Bretlandi er ætlanin at bora Skerryvore brunnin, har Parkmead er fyristøðufelag, umframt Aurora brunnin, ið kann innihalda stórar nøgdir av gassi, sigur hann.

- Eisini er boriætlanin í norskum øki við at verða løgd. Har er Napoleon North kandidatur til boring í 2016, og vit hyggja eftir øðrum møguleikum, ið liggja styttri frammi, sigur Ben Arabo.